## DAGSINS MEINING

# Grim, ómenniskjanslig og niðurgerandi revsing

Mánadagin 10. oktober var ikki bert altjóða sálarheilsudagur. Hann var eisini altjóða dagur móti deyðarevsing. Ein altjóða felagskapur World Coalition against Death Penalty skipar á hvørjum ári fyri tiltøkum 10. oktober við tí endamáli at seta fokus á stríðið fyri at fáa deyðarevsing avtikna. Í ár var ljós varpað á deyðarevsing í Afrika. Fleiri afrikonsk lond hava longu avtikið deyðarevsing. Av teimum 53 londunum í Afriku hava 12 lond heilt avtikið deyðarevsing.

Amnesty International og WCADP eru av tí fatan, at deyðarevsing er ein grim, ómenniskjalig og niðurgerandi revsing og heitir tí við hesum átaki á ríkisleiðarar og myndugleikar í Afrika um at gevast við hesi revsing. Øll rætthugsandi fólk mugu geva Amnesty og WCADP rætt. Deyðarevsing hoyrir ikki heima í einum humanum og siviliseraðum heimi. Tað er í grundini heilt ófatiligt, at eisini demokratisk samfeløg framvegis fremja deyðarevsing. Her er eitt øki, har avís demokratisk lond líkjast einaræðislondum. Sum kunnugt er Kina á odda við deyðarevsingum og síðan koma USA og Iran. Hetta eru syndarlig met og er týtta nýtslan av deyðarevsing í USA ein skammblettur á fólkaræðinum og á vesturheiminum.

Deyðarevsing kann ikki góðtakast, tí deyðarevsing er inhuman, ómenniskjanslig og endalig. Hetta, at revsingin er endalig merkir, at tað ber ikki til at rætta eitt møguligt mistak hent undir rættargongd. Av somu orsøk kemur ferð eftir ferð undan kavi, at ósek fólk eru tikin av døgum, eitt nú í USA. Øll menniskju uttan mun til politiska áskoðan ella trúgv eiga at virka fyri, at deyðarevsing verður avtikin um allan heimin. Nú er herferðin móti deyðarevsing so vend ímóti Afrika. Tað er gott, tí enn eru heili 27 lond í Afrika, sum seta deyðadómar í verk. Hetta verður eitt tógvið stríð, men glottar eru og alt fleiri lond í Afrika eins væl og í øllum heiminum taka av deyðarevsingina. Tað, sum hevur allrastørsta týdningin, er, at fáa deyðarevsingina avtikna í USA. Hetta tí USA er heimsins undangonguland á flestøllum økjum. Hevði tað eydnast at fingið USA at hildið uppat við at fremja deyðadómar, so vildi tað fingið ómetaligan moralskan týdning fyri altjóða stríðið móti hesi barbarisku, og inhumanu revsing.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bingjuhavn á Oyrareingjum

**Beate L. Samuelsen**
*Býráðslimur í Havn*



Á býráðsfundi Havn atkvøddi bert ein ímóti, at Kollafjørður skal neyðtakast av stórum bingjuskipum í framtíðini. Og tað var undirritaða. Broytingini av byggisamtyktini fyri Oyrareingir førir við sær, at stórt havnaøki skal byggjast har, hóast kærur komu inn viðvíkjandi málinum

21. apríl í ár tók Tórshavnar býráð undir við tilmælinum um at broyta samtyktina fyri Kollafjørð, soleiðis at F-vinnuøki á Oyrareingjum varð broytt til B1-havnaøki.

Málið hevði ein mánað frammanundan verið fyri í Kollafjarðarnevndini, sum tók undir við broytingini av byggisamtyktini.

Tí var einki at siga til, at allir býráðslimir tóku undir við málinum í býráðnum á fundinum í apríl.

Málið skein langan veg av semju og idyl, einki vrøvl av nøkrum slag, og varð tí samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Tað var so sólarklárt, at hetta var eitt fínt uppskot. Tað hildu øll, sá tað út til.

Á borgarafundi í Kollafirði, har undirritaða ikki var hjástødd, frættist, at heldur ikki har var mutað nakað serligt móti ætlanini, tá tað var umrøtt.

Sostatt tyktist tað okkum øðrum, at kollfirðingar í sátt og semju tóku undir við broytingini av byggiætlanini.

### Larmur og gangur

Aftan á samtyktina í býráðnum, var dagurin 5. august 05 settur, um onkur ætlaði at mótmæla ætlanini. Tá freistin var úti, vóru tvey mótmæli komin inn.

Serliga hugsi eg um annað av hesum, ið átta kollfirðingar hava undirskrivað. Hetta eru fólk, sum nýta sín fólkarætt og gera vart við seg, tí tey búgva har á staðnum. Tey kenna økið sum sín egna buksulumma. Tey vita, hvussu veður og vindur á ymsu ættunum arta seg har, og tey hava við berum eygum sæð, hvussu harðar hvirlur sum ein lort kunnu lyfta bingjur av havnaøkinum og út á sjógv. Sjálvandi vilja tey, sum búgva har, ikki hava hetta náttúruvakra og friðarliga umhvørvi oyðilagt av risastórum bingjuskipum, við øllum tí larmi og gangi, sum slíkt virksemi nú einaferð hevur við sær.

Tí tað er ikki, sum bæði Leivur Hansen úr Tjóðveldisflokkinum, og Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum vilja vera við, bara talan um at fáa gjørt ein lítlan keikant á Oyrareingjum fyri, sambært teirra egnu útsagnum á býráðsfundinum hóskvøldið, at fjala yvir óruddið, sum liggur har!

Talan er um at byggja eitt havnaøkið, har bingjuskip skulu kunna leggja at fyri at lossa og lasta bingjur.

### Annað stað ávíst

Tá ein partur av bygdafólkinum ikki vil vita av ætlanini hjá Tórshavnar Býráð um at broyta byggisamtykina fyri økið, sum liggur inni á Oyrareingjum, kunnu vit sum býráð ikki lata hetta ynski teirra fara fram við og bara lata sum einki.

Í broytingini av byggisamtyktini liggur, at ein bingjuhavn til størri skip skal byggjast á Oyrareingjum, og kunnu vit sum býráð ikki bara sita og kroysta eina broyting av eini byggisamtyktini niður yvir tey fyri at sleppa eina kei har.

Fólkini, sum skrivað hava hetta eina mótmæli móti broyttu byggisamtyktini á Oyrareingjum, vilja við hesum vísa sína ónøgd.

Tað mugu vit respekterera.

Tey eru tó so positiv sinnað, at tey koma við uppskoti um í staðin at leggja havnavirksemi úti á Sperm, har sum hvalastøðin var, tí har býr ikki ein sál.

Álvaratos, kunnu vit vera tað bekent at oyðileggja Kollafjørð við eini ætlan sum hesari við eini bingjuhavn á Oyrareingjum?

Tá atkvøtt var um uppskotið á býráðsfundi hóskvøldið 6. okt. 05, varð tað samtykt við níggju atkvøðum fyri.

Tveir býráðslimir greiddu ikki atkvøðu, og eittans atkvøða var ímóti. Tað var mín.

# Lusk?

**Sminkað kunning**

**Thomas Arabo**



Hoyrdi viðtal við Leivur Hansen í útvarpinum í kvøld, sunnukvøld. Ikki eiti á romantisk versión, hann kom við um havnaútbyggingina á Oyrareingjum. Ein fekk nærmast ta fatan, at har skuldi gerast ein "blomsturkassi" við einum pinkulítlum keikanti, og so hendi ikki meira í hesum valskeiðinum. Harafturat so vóru tað bara 8 Kollfirðingar, sum høvdu mótmælt.

Hattar síðsta er sannheit, tí tað vóru helst ikki stórt meira enn hesi 8, sum høvdu sæð alt málið! Eg var ein av teimum 8, sum aftan á at hava hoyrt eitt graml um, at her var nakað kollveltandi á tapetinum, bað um alment innlit. Og ikki eiti á mál!

### Veruleikin

Fyrst verður upplýst, at tað, sum nú verður gjørt, er ein liður í eini heildarætlan. Hendan ætlan gongur út uppá at byggja ein mola nakrar fáar metrar út frá Signabøslandinum heilt út til núverandi bátahyl. Gangi út frá, at hettar verður gjørt fyri at sleppa undan at fáa góðkenning frá friðingarmyndugleikunum. Fjørðan er, so vítt eg veit, friðað.

Harafturat skal økið víðkast niðaneftir, so landsvegurin, ið er einasta beinleiðis samband til bygdina hinumegin, har allir felagsaktivitetir í Kollafirði eru, skal kvettast av, og ferðslan leggjast niðan í tunnilsvegin, inn í rundkoyringina og síðan út til Sjógv. Hettar váttar borgarstjórin í Vikuskiftissosialinum.

### Ullint góðkenningarmannagongd

Tað sum er so forundarligt

*Framhald á síðu 11*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.